## Hetjurnar vera við

Sum tað sømir seg, so hevur Fótbóltssambandið boðið spælarunum frá Landskronaliðnum at vera við, tá Eysturríki kemur á vitjan leygardagin. Soleiðis vera Abraham, Torkil, Allan og allir hinir millum teir vónandi mongu áskoðararnar á Tórsvølli, og hvør veit, um ikki onkur orð verða søgd teimum til heiðurs eisini. Tað eru í øllum førum allar góðar orsøkir til, nú talan er um endurminning um størstu løtuna í føroyskari fótbóltssøgu.



## Netsølan endar mikudagin

Í eina tíð hevur borið til hjá landsliðsáskoðarum at keypa atongumerki til landsdystin í forsølu á nethandlinum hjá FSF, www.football.fo. Fótbóltssambandið hevur nú boðað frá, at forsøluprísurin broytist mikudagin klokkan 14, tá prísurin verður tann sami, sum um keypt verður dyrnar. T.v.s. 300 krónur fyri vaksin og 75 fyri børn.



ørsta løtan í føroyskari fótbóltssøgu. Torkil Nielsen smekkar bóltin fram við Michael Konsel. Konsel hevði tá just vunnið troyggjuna linum á landsliðnum, og hann var í drúgt áramál fremsti málverjin hjá landinum.

spælt í B36, HB, íslendska ÍBV og nú AB. Er ein av bara tveimum spælarum, sum hava vunnið FM við trimum føroyskum feløgum, umframt at hann longu eina ferð hevur vunnið uppflyting við AB, har hann nú er spælandi venjari. Er útbúgvin krambakallur og námsfrøðingur, men starvast í dag sum timburmaður.

**Abraham Hansen (nú Løkin):**
Miðvallarovastin hevur eitt merkisvert met í føroyskum fótbólti, har tað gingu 26 ár millum fyrsta og seinasta dyst hansara í bestu føroysku deildini. Sum spælari gjørdi hann um seg hjá ÍF, B36, NSÍ og B68, umframt at hann á ungum arum eisini var í bæði svenskum og donskum fótbólti. Í borgarliga starvinum hevur hann seinnu árini arbeitt innan útflutningsvinnuna, og er hann í dag í starvi hjá SNG.

**Torkil Nielsen:**
Stóra hetjan úr Landskrona. Hóast fótbóltsevnini vóru eyðsýnd og kanska til nakað meira, so spældi hann øll árini við SÍF og FS Vágum. Og í aðrar mátar er talan eisini um ein merkisverdan ítróttarmann, sum hevur verið á talvlandsliðnum, unglingalandsliðnum í flogbólti og í landsliðshópinum í hondbólti. Støðu- og trúfesti hevur eisini eyðkent privatmannin, Torkil Nielsen, sum enn starvast hjá Sandavágs Timburhandli.

**Kári Reynheim:**
Íspegilin á liðnum, sum altíð hevði sjálvsálitið í lagi, um enn avbjóðingarnar vóru ovurstórar. Og sum bæði á og uttan fyri vøllin var spælarin, sum kundi lyfta lagið. Spældi fyri HB og B36, umframt at hann eitt skifti var í norskum fótbólti. Hevur seinnu árini roynt seg sum venjara, men enn hevur hann ikki veruliga fingið sítt gjøgnumbrot í hesum. Starvast sum elektrikari í frítíðini.

**Jan Dam:**
Eingin ivi er um, at Jan taldist millum mest gávaðu føroysku spælararnar yvirhøvur, og fram til aldarskiftið var hann eisin fastur fúsur á landsliðnum. Sum spælari royndi hann seg hjá bæði HB, KÍ og B68, umframt at hann var hjá danska Herfølge eitt stutt tíðarskeið. Er útbúgvin lærari.

**Kurt Mørkøre:**
Var í nógv á rein av vandamestu føroysku áleyparunum, og í Klaksvík hevur hann mest sum legendu-status. Royndi seg eisini í norskum fótbólti, har hann eisini hevur nomið sær venjaraútbúgving. Eina útbúgving, sum hann eisini hevur nýtt hjá KÍ og B36. Er nú aftur í Noreg, har hann eisini roynir seg sum venjara.

**Eykamenn**
Kaj Leo Johannesen, sum nú er Føroya løgmaður. Magni Jarnskor, Poul Enok Hansen sáli, Jens Erik Rasmussen og Gunnar Mohr.

# EYSTURRÍKI 1990

**Michael Konsel:**
Málverjin hevði tá just vunnið troyggjuna við 1-talinum frá Klaus Lindenberger, og hesa helt hann fast um gjøgnum eina langa yrkisleið, har hann eisini vardi málið fyri AS Roma og AC Venezia í italsku seriu A. Rekur í dag eitt ítróttar-agentur, har hann first og fremst selur sín egna person til ymisk event. Eisini er hann javnan frammi sum viðmerkjari í eysturríkskum fótbóltssendingum.

**Robert Pecl:**
Viðeyknevndinum Jarnfóturin ella Red Robert var talan um ein hart tacklandi verjuspælara. Hann helt fram í fótbóltinum til 1995, og er í dag sølumaður fyri Diadora.

**Michael Streiter:**
Verjuspælarin er í dag hjálparvenjari hjá Co Adriaanse í Red Bull Salzburg.

**Jürgen Hartmann:**
Vinstri bakkurin er í dag aðalskrivari hjá eysturríkska kurvabóltsfelagnum Kapfenberg Bulls. Felagið var í drúgt áramál sterkasta felagið í landinum, og í dag er tað ein støða, sum teir royna at endurvinna.

**Kurt Russ:**
Hevði eina sera drúgva yrkisleið, har navnabrævið fór um tey 40 árini, áðrenn hann setti gaggurnar. Er í dag hjálparvenjari hjá Kapfenberg í fremstu eysturríksku fótbóltsrøðini.

**Heinz Peischl:**
Er í dag arbeiðsleysur venjari, eftir at hann annars hevur vant lítla men kenda sveisiska FC Thun, sum eitt skifti var við í Champions League-bólkaspælinum. Peishl kom tó til felagið eftir hetta, og í dag gongst ikki felagnum eins væl.

**Manfred Linzmaier:**
Miðvallarin starvast í dag sum askóti fyri Red Bull Salzburg, og er tað serliga á suðuramerikanska spælaramarknaðinum, at hann roynir at finna framtíðarinnar spælarar.

**Andreas Herzog:**
Maðurin við 10-talinum var í fleiri ár playmakari hjá Werder Bremen, og verður roknaður sum ein av bestu spælarunum hjá Eysturríki í nýggjari tíð. Er í dag hjálparvenjari á landsliðnum undir Karel Brückner

**Gerhard Rodax:**
Ljóshærdi áleyparin, sum í 1990 gjørdi um seg í sponskum fótbólti, er í dag venjari hjá eykaliðnum hjá Admira í triðju bestu deildini. Eigur og rekur eisini eina tennis-miðstøð.

**Toni Polster:**
Ein tann vandamesti áleyparin í europiskum fótbólti í 90'unum, og hevur tí eitt sera stórt navn í heimlandinum. Er í dag sonevndur Self-promoter, har hann tekur gjald fyri at vera partur av ymsum events. So eitt veruligt arbeiði kann hetta ikki roknast sum.

**Andreas Reisinger:**
18 ár og 20 kilo seinni er hann venjari hjá eykaliðnum hjá meistarunum úr Rapid. Eykaliðið spælir í triðju bestu deildini í Eysturríki.

**Á beinkinum**
Peter Pacult, sum nú er venjari hjá meistaraliðnum, Rapid, Gerald Wilfurth, sum er stjóri í lítla felagnum, Winer Neustadt.